# Vildi ynskt at borgarstjórin tók endaliga støðu

**Tað órógvar býráðsarbeiðið í Klaksvík, at borgarstjórin ikki tekur endaliga støðu til um hann fer úr Tjóðveldisflokkinum ella ikki. Men í løtuni er ikki orsøk til at halda annað enn at gjørdar avtalur halda, sigur Rani Nolsøe, býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin**


*Rani Nolsøe heldur, at tað hevði verið ynskiligt um borgarstjórin tók eina endaliga støðu*

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit hava nakrar greiðar avtalur í býráðnum. Og eg dugi ikki at síggja annað enn tað, at tær fara at halda.

Rani Nolsøe er býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin í Klaksvík. Men hann hevur ein borgarstjóra, sum eitur Steinbjørn O. Jacobsen, sum eisini er valdur á tjóðveldislistanum. Men hesin sami borgarstjóri hevur boðað frá, at hann umhugsar sína støðu í Tjóðveldisflokkinum í kjalarvørrinum á samtyktini í Løgtinginum um at seta kynsligan samleika upp í grein 266 b í revsilógini.

Men síðani hevur hann ikki sagt nakað yvirhøvur um sína politisku framtíð og tað vil hann ikki enn siga nakað um.

Vit hava spurt Rana Nolsøe um tað ávirkar býráðsarbeiðið, at floksfelagi hansara, sum stendur á odda fyri býráðnum, letur sína politisku framtíð hanga í leysari luft.

Rani Nolsøe sigur, at í vanliga býráðsarbeiðnum hevur tað onga ávirkan. Men í aðrar mátar ávirkar tað kortini.

- Borgarstjórin er framvegis limur í Tjóðveldisflokkinum og eftir at hava tosað við borgarstjóran meiri enn einaferð, havi eg ikki orsøk til at halda annað enn tað, enn at tær avtalur, vit hava gjørt, fara at halda alt valskeiðið út.

Hinvegin ásannar hann, at verður endaliga avgerðin hjá borgarstjóranum tann, at hann fer úr Tjóðveldisflokkinum, er tað ein heilt onnur støða og so má tað takast upp tá.

Men hvat so hendir, er ein tilhugsaður spurningur, sum Rani Nolsøe ikki brúkar orku upp á, sum landið liggur nú.

Kortini staðfestir hann, at tað hevði avgjørt verið ynskiligt, at borgarstjórin kom við eini endaligari fráboðan um sína politisku framtíð.

- Tað órógvar at borgarstjórin letur spurningin hanga í leysari luft, uttan at taka eina endaliga støðu. Tað ger, at hvørja ferð, vit skulu tosa um politisk mál, fer fyrst ov nógv tíð til at tosa um politisku framtíðina hjá borgarstjóranum, áðrenn vit koma til tær veruligu viðgerðirnar. Tað er ikki serliga effektivt og tí hevði tað avgjørt verið ynskiligt, at Steinbjørn O. Jacobsen tók eina endaliga avgerð, sigur Rani Nolsøe

## Fáa pengarnar aftur

**Demokratia-nevndin fær nú tær 45.000 krónurnar aftur, sum nevndin betalti til umstrídda tiltakið á kvinnudegnum**

KVINNUDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður kortini ikki við almennum pengum, at skipað verður fyri tiltakið á altjóða kvinnudegnum.

Demokratia nevndin hevði goldið 45.000 krónur til tiltakið, tí hon metti, at fyrilestrarnir vóru so áhugaverdir, at tað var rætt at vera við

Tað, sum hevur loypt øði í politikarar er, at atgongumerkini kosta 1000 krónur og at ársins kvinna skal veljast og har eru í uppskotið nøvn, sum vóru virkin í arbeiðnum at fáa kynsligan samleika upp í 266 b í revsilógini.

Lena Mohr, blaðstjóri á Kvinnu, segði við Útvarpið fríggjadagin, at tey hava gjørt av at betala Demokratia peningin aftur fyri at forða fyri, at nevndin syndrast.

Her sipaði hon helst til, at Miðflokkin hevur hótt við at rýma úr nevndini og at eisini aðrar kvinnur, sum eru virknar í politikki, hava víst sína misnøgd

Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í nevndini, segði samstundis við Útvarpið, at tað mest umráðandi er, at nevndin fær arbeiðsfrið og at peningurin nú skal brúkast til onnur endamál.

Spurningurin er bara um tað verður friður, tí hon væntar framvegis, at Demokratia verður við í tiltakinum sum fyriskipari, tí tey halda, at fyrilestrarnir eru so mikið áhugaverdir.


KOM OG GER KVETTI !!!

BUKSUR
TAK
3 PØR
FYRI
600,-

ANNARS
ØLL
VØRA
FYRI
1/2
PRÍS

SKÓGVAR
TAK
2 PØR
FYRI
500,-

HÚGVUR
KEPPAR
TAK 4 STK
FYRI
200,-

T-SHIRT
TAK
4 STK
FYRI
200,-

X-SIZE
Sverrisgøta 17 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 80 09 – 22 76 07
x-size@post.olivant.fo